FRÁFARINGARROYND FÓLKASKÚLANS
maj-juni 2011

Føroysk fyrisøgn

(Fyrst verður fyrisøgnin lisin í síni heild, síðan verða eini 3-5 orð, sum tað hóskar, lisin tvær ferðir. Av teknum verða bara punktum lisin, og reglubrotini verða tilskilað. Tað er næmingunum loyvt at brúka føroyska orðabók til royndina.)

Fornesku verður stavað fyri teimum.

Gandur

Um ár 1600 fór stór heksajagstran fram í okkara grannalondum, men í Føroyum vita vit ikki um, at nakar er brendur á báli fyri gand.

Tað kann ein undrast á. Ein orsøk er óivað tann, at fólk her á landi ikki ræddust gand á sama hátt, sum fólk í øðrum londum gjørdu. Fólk trúðu upp á gand, men ikki sum ein óndan mátt í sjálvum sær. Nógv fólk dugdu gand, men tey flestu vóru ikki illa umtókt. Summi vóru høgt vird.

Veruleikin var tann, at heldur enn at ræðast gand, so høvdu fólk brúk fyri gandinum. Nógv tey flestu, sum í sagnunum duga gand, brúka hann til tað góða. Til at bøta um arbeiðseydnu og til verju móti teimum kreftunum, sum fólk veruliga ræddust. Tað kundi vera huldufólk, vættrar og tey *fornesku*, sum gjørdu lívið so vandamikið og trupult at liva.

Gandurin var mest ein hjálp hjá fólki, og tá fóru tey ikki at klaga nakran fyri gand. Tó er okkurt undantak. Til dømis brúkti Barbara við Kvíggjá gandin at gera ilt, helt tann, ið ákærdi hana. Søgnin sigur, at hetta var ein misskiljing. Hon hevði viljað gjørt væl.

Vit mugu tí koma til ta niðurstøðu, at fólki einki hevur dámt, at Páll fangi varð ákærdur fyri gand og settur fastur. Her verður ósemja millum fólk og rættin um, hvat er skeivt, og hvat er rætt.

At seta ein mann fastan fyri gand, ein mann, ið ongum hevði gjørt nakað, hevur ivaleyst verið ímóti rættarfatanini hjá fólki. Við hesum fyri eyga má tí eisini metast um søgnina um Páll fanga.

Úr: "Úr søgn og søgu ", Eyðun Andreasen (tillagað)